# Latið nú bara valini koma

EILIF SAMUELSEN



Alt síðani 1852 hava Føroyar havt 7 valdømi. Frá 2007 eru allar Føroyar at rokna sum eitt valdømi. Hetta kann tykjast at vera ein ógvuliga stór broyting. Men hyggja vit at, hvussu samskiftirmøguleikarnir í breiðastu merking eru broyttir frá 1852 og til í 2007, so mugu øll ásanna, at tað er ikki meira enn rímiligt, at framburðurin endurspeglast í samfelagsstrukturinum. Ein av hesum natúrligu og neyðugu rationaliseringunum er, at allar Føroyar sjálvandi eiga at roknast sum eitt valdømi.

Allir dómadagsprofetarnir, sum vildu seta niður kommissiónir og nevndir fyri at køva málið, og sum spáddu, at demokratiið hevði sæð sínar bestu dagar her á landi, og at útjaðarin fór at fara heilt í rot, at útjaðarafólk (hvørji tey so eru) fara at missa hugin at fara á val, teir fara óivað at síggja, at alt fer at laga seg nógv betur, enn tað var frammanundan. Øll tey, sum vilja, at alt skal vera, sum tað altíð hevur verið, verða nú noydd at hyggja inn í framtíðina við nýggjum eygum. At ein partur av valdu løgtingslimunum nú hava tikið seg saman og hava víst dirvi at gera nakað við framtíðini í huga og sum fer at styrkja ta demokratisku tilgongdina í framtíðini, tað er bara at frøast um.

**Gjørdi Edmund rætt?**

Nógv hevur verið tosað um, at tað var skeivt av løgtingsformanninum at leggja hetta uppskotið um eitt valdømi fram. Men tað er uttan fyri nakran iva, at var tað ikki júst formaðurin, sum setti tað fram, so hevði eitt slíkt uppskot ongantíð á ævini verið samtykt. Fýra ferðir áður hava ymisk tingfólk lagt uppskot fram um eitt valdømi, men hvørja ferð er tað kulað niður. Var tað andstøðan, sum kom við uppskotinum, so var tað prædestinerað, at tað var felt. Við teimum royndum vit hava av samgongum, so er tað við vissu givið, at hon hevði ikki sloppið at lagt eitt slíkt uppskot fram.

Við øllum sum vit gera, eru bæði fyrimunir og vansar. Tað hevur verið lætt hjá ymsum serfrøðingum og ávísum tinglimum, sum hava hildið seg fara at verða raktar av rekylinum frá uppskotinum, at vísa á vansar. Men meirilutin í tinginum hevur so hildið, at vansarnir fara at verða at liva við, og at fyrimunirnir í nógv størri mun fara at viga upp ímóti vansunum. Tað kann væl vera, at tað geografiska býtið av tinglimum fer at verða eitt sindur øðrvísi, enn núgaldandi lógin hevur tvíhildið um. Men er tað nú so galið, at demokratiið verður loyst úr fjøtrandi bondum, og at alt Føroya fólk endiliga sleppur at manna løgtingið á javnbjóðis hátt?

**Hvat nú við veljarafeløgunum?**

Nevndin í Norðoyar Sambandsfelag skal hava tað rós, at hjá teimum er stutt frá tanka til handling. Tað hava tey mangan víst áður. Tá ið átakið um fleiri kvinnur í politikki rættiliga poppaði upp í fjølmiðlunum, var nevndin skjót at melda út, at hon fór at stilla líka nógvar kvinnur sum menn á listan. Gott dømi at taka eftir! Men tey vóru kanska í so skjót á klikkipinninum, tá ið tey avráddu, at gjørdust Føroyar eitt valdømi, so var grundarlagið undir veljarafeløgunum burtur, og at Norðoya Sambandsfelag kundu líka so væl fáa kúluna fyri pannuna við brestin.

Men veruleikin verður ein heilt annar. Lokalfeløgini fara at hava akkurát líka nógvar uppgávur, sum tey altíð hava havt. Tey fara framvegis at mæla sínum landsfelag til, hvørji úr teirra øki eiga at vera millum tey í mesta lagi 45, sum flokkurin stillar upp til løgtingsval. Annars hava feløgini tær somu upplýsandi og eggjandi uppgávurnar, sum tey altíð hava havt.

Teir valdu politikararnir fáa nú eina víðkaða skyldu. Fyrr skuldu teir fyrst og fremst hava kontakt við sítt egna veljarafelag. Nú hava teir sjey lokalfeløg, sum umboða teirra veljarar. Hesi skulu røkjast bæði væl og virðiliga, hava teir sítt politiska lív kært, og eftir sum politikararnir nú fara at arbeiða javnt fyri alt landið, fara vit kanska at sleppa av við handan spjaðandi og køvandi skilnaðin millum útjaðara og miðstað.

Val til løgtingið verður í seinasta lagi 19. januar komandi. Tá sleppur nýggja skipanin at royna seg, og eingin ivi er um, at hon fer at roynast heldur frægari enn pessimistarnir hava spáað. Fólkatingsval verður eisini um miðjan november, og við tað valið hava Føroyar altíð virkað sum eitt valdømi. Og eitt er heilt víst, at valskipanin hevur ikki skyldina í, at nógv halda, at tað eru tey skeivu valevnini, sum verða vald.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu
og hjálpsemi, tá góði maður mín og pápi,
verpápi, abbi og langabbi okkara

**Dánjal Petur Hansen**
(á stykkinum) Nes

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum dagliga vóru um hann
øll hesi mongu ár hann var sjúkur.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Parkinsonfelagið.
Tøkk til øll tykkum, ið fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Mary,*
*Elsa, Margretha, Hans Terji, Andrias,*
*Alberg, Magnus, Dagmar og Eyðbjørg*

## Tøkk

Vit takka øllum tykkum, sum á ymsan hátt
hjálptu til tá

**Kári Jensen**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri samkenslu og troystarrík orð
og tøkk til tykkum øll, ið vístu honum
seinasta heiður til jarðarferðina.

***Familjunnar vegna***
*Heri Jensen*

# Bjóða øllum at stilla upp til fólkatingsval

**Tjóðveldi hevur gjørt av at hava ein opnan lista til fólkatingsvalið, so at tey lokalu limafeløgini kunnu stilla so nógv valevni upp, sum tey hava hug til. Og tey fyrstu nøvnini eru longu klár**

FÓLKATINGSVAL
*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo

Tjóðveldið hevur longu latið startskotið av til valstríðið í sambandi við fólkatingsvalið.

Á eykaflokstingið í gjár varð avgjørt, at flokkurin skuldi hava ein opnan lista til valið. Tað merkir, at tjóðveldisfeløgini runt um í landinum, kunnu stilla so nógv valevni upp, sum tey vilja.

Tað ber til, tí til fólkatingsval er tað óavmarkað, hvussu nógv kunnu stilla upp, men hvørt valevni skal hava ein stillara.

Og tey fyrstu nøvnini eru longu komin á ein lista, men flokkurin ger vart við, at talan er um ein fyribils lista og at tann endaligi listin verður klárur seinni í vikuni.



*Tjóðveldi ætlar at hava ein fjølmentan lista á fólkatingsvalinum 13. novembur og tey fyrstu nøvnini eru longu klár. Endaligi listin verður klárur um fyrsta dagin*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Tey, sum fyribils eru í umbúna at stilla upp til fólkatingsval fyri Tjóðveldi, eru Høgni Hoydal, Annita á Fríðriksmørk, Heini O. Heinesen, Heidi Petersen, Hergeir Nielsen, Bjørt Samuelsen, Sjúrður Skaale, Tórbjørn Jacobsen, Jórun Høgnesen, Petur í Gong, Róaldur Jákupsson, Bergtóra Høgnadóttir Joensen, Jákup Petersen, Óluva Klettskarð, Niklái Petersen, Olga Biskopstø og Sólfríð Flallsbak.

Sostatt eru níggju mannfólk og átta konufólk á fyribils listanum hjá Tjóðveldinum til fólkatingsvalið.

Einastu løgtingslimir, sum ikki stilla upp, eru Finnur Helmsdal og Páll á Reynatúgvu.

Ætlanin er at hava endaliga listan kláran ein av allarfyrstu døgunum.